# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/02  - 18. februar 2021 16:00-18:00

### Skrá:

1. 1.flokkur komandi skúlaár
2. Málið um 3 ella 4 flokkar?
3. Tilfar sum heild og felags lesibók
4. Ferðsluskipan og Av og á skipanin
5. Ymiskt
6. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

Møtt: Regin, Súna, Birgir, Sjúrður, Derhard, Erla & Snorri
Forfall: Eingin

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**1.flokkur komandi skúlaár**
Kommunan kunnar um, at tey arbeiða við málinum. Tískil er einki nýtt at frætta enn, hóast vit fingu fráboðan um, at málið skuldi vera avgreitt til hendan fundin.
Samstundis boðar kommunan frá, at skúlastýrið er hoyringspartur í málinum, um so er, at tilmælið verður øðrvísið enn skúlabygnaðurin í løtuni leggur upp til.
Væntast kann tí, at skúlastýrið verður kallað saman sum hoyringspartur innan næsta fundin.

Ad.2
**Málið um 3 ella 4 flokkar?**
Leiðslan kunnar um at leiðslan mælir frá, at farið verður til 4 spor. Hetta gevur ov nógvar fyriskipanarligar trupulleikar við hølum, hølisnýtslu, atkomiligheit hjá frítíðarskúlanum og óneyðugum trongsli sum heild í skúlanum. Harumframt kostar tillagingin í innbúgvi í einari 4.fl stovu til 1.flokk 150.000 í eini eingangsupphædd. Eftir trý ár skal nýútvegan til til innbúgv í miðdeild.
Skúlastýrið hevur ikki eina greiða støðu til málið enn. Skúlastýrið ynskir sum útgangspunkt, at børn í nærumhvørvinum skulu sleppa í skúlan. Samstundis ynskir skúlastýrið ikki, at skúlin verður yvirfyltur á ein hátt, so hann verður óskynsamur at reka.
Semja er um at bíða at viðgerða hetta meira til ein samtykt frá kommununi fyriliggur.

Ad.3
**Tilfar sum heild og felags lesibók**
Foreldraumboð kontaktað av foreldri um nýtsluna av tilfari í lesing í miðdeild. Ítøkiliga snýr hetta seg um Tsatski, ið varð latin næmingunum sum gáva. Skulastýrið hevur ikki eina greiða støðu til ítøkiliga tilfarið,

men mælir til at skúlin er umhyggin, tá felags tilfar verður valt, og at frílestarbøkur, sum eru populerar, framyvir eisini verða nýttar sum frílestrarbøkur.

Ad.4

**Ferðsluskipan og av og á skipanin**

Foreldur hava kontaktað foreldraumboðini. Bilar standa á av-og-á økinum heilar dagar. Hetta er óheppið. Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at fáa til vega eina frágreiðing frá kommununi um ferðsluviðurskiftini kring skúlan har ein eftirmeting og neyðugar tillagingar eru partur av frágreiðingini.

Ad.5

**Ymiskt**

Kommunustýrisumboðini ynskja at fáa kantinuna stovnaða sum mál, so gongd kemur formelt á hetta. Víst verður til frundafrásøgn 2021/2024-01. Málið verður sett aftur á skrá til næsta fund. Skúlastýrið ynskir at Sigurð Ó Vang, leiðari á Mentamáladeildini leggur fram um ætlanir og møguleikar við kantinuni sum grundarlag undir framhaldandi viðgerð.

Ad.6

**Áseta næsta fund**

Næsti fundur er ásettur til tann 22. apríl 2021 kl 16:00-18:00
Derhard ger skrá til fundin og Regin kallar inn.

Regin Marnersson, skrivari
Derhard Jógvansson, skúlastýrisformaður